


# SALTSILO SUM ALTJÓÐA MENTANARDEPIL

ARBEIÐIÐ AT **UMSKAPA** SALTSILOINA Á DRELNESI TIL ALTJÓÐA KONSERTHÚS OG LISTASAVN GONGUR STØÐUGT **FRAMÁ**. NÚ ER GRUNNURIN **STOVNAÐUR**, NEVNDIN ER MANNAÐ, OG GONGD ER EISINI Í ARBEIÐNUM AT FINNA **FÍGGING** TIL BYGGINGINA





**SALTSILO**
**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Um eina viku verður stór konsert í Saltsiloini á Drelnesi í Suðuroy. Samstundis sum konsertin verður hildin, ber til at staðfesta, at stórsligna ætlanin um at gera siloina til ein altjóða mentanardepil er komin nærri veruleikanum.

Í farnu viku vóru endaligu viðtøkurnar fyri Saltsilogrunnin góðkendar, og nevndin fyri grunnin er mannað. Slíkur grunnur verður ikki stovnaður, uttan at ítøkilig frambrot eru og eru á veg.

Í nevndini eru Ólavur Rasmussen, sum er hevur verið høvuðsmaður fyri ætlanina síðani byrjan, hann er formaður. Afturat honum er búskaparfrøðingurin Juanna Schrøter Joensen og Christian Mejdahl, sum er fyrrverandi formaður í Fólkatinginum, hann er føddur á Tvøroyri.

### Skitsur gjørdar

Saltsiloin á Drelnesi var bygd beint fyri seinna heimsbardaga. Ætlanin við henni var at gera tað lættari at veita salt til føroyingar. Siloin varð bumbað undir krígnum, men hon var gjørd í stand aftur og virksemi var í henni til seinast í sjeytiárunum.

Bygningurin er sermerktur, og fólk vita ikki um slíka saltsilo aðrastaðni. Møguliga skal ein vera í Bilbao. Felagið, sum bygdi siloina í Føroyum, ætlaði at gera aðrar siloir á okkara leiðum, men kríggið gjørdi enda á teirri ætlanini.

Seinastu árini hevur verið arbeitt við at gera saltsiloina á Drelnesi til ein mentanardepil. Fyrstu strikurnar eru teknaðar av Albert Isfeld, og tey, sum standa fyri arbeiðnum at umskipa siloina til mentanardepil, vilja hava, at siloin verður konserthøll og listaskáli, har altjóða framsýningar kunnu haldast.

### Tekur trý ár at byggja

Gongd er í arbeiðnum við saltsiloini, men